## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Lot til andøvsgul lágt. Skýggjað og møguliga ælingar. Út á náttina gongur hann eysturá, og tað verður samdrigið og møguliga fer at regna. Hitin fer at liggja millum 9 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Lot til andøvsgul millum eystan og norðan. Skyggjað og møguliga regnar av og á. Seinni verður eitt lítið lot av ymsum ættum, og tað klárar eitt sindur í. Hitin verður um dagin millum 9 og 13 stig. Um náttina niður í 7 stig.




**Veðrið leygardagin**
Hann veksur vindin av suðri og útsynningi. Skýggjað og regn av og á. Hitin liggur millum 8 og 12 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi. Mánadagin veksur hann møguliga upp í ein srúk av útsynningi. Skýggjað og regn av og á. Hitin liggur millum 8 og 12 stig.

# Norðlýsið til fiskiskap

**Norðlýsið bjóðar nú eisini fólki ein túr í Nólsoyarfjørð at fiska. Túrarnir hava fingið bæði føroyingar og útlendingar at taka snøri ella tráðu í hond**

STUTTLEIKAFISKING

Higartil hevur Norðlýsið mest verið brúkt til útferðir, men sum nakað nýtt er Birgir Enni, sum er skipari, farin at sigla fólk í Nólsoyarfjørð til at fiska.

– Tað hevur leingi verið eftirspurningur eftir slíkum túrum, men eingin hevur rættiliga kunna givið fólkið hendan møguleikan. Tí gera vit nú tveir fiskitúrar um vikuna, sigur Birgir Enni.

Fiskiskapurin byrjaði fyri kortum, men undirtøkan fyri túrunum hevur verið stak góð. Túrurin varðar einar tríggjar tímar, og farið verður í Nólsoyarfjørð.

– Tað eru bæði útlendingar og føroyingar, sum hava verið við á túrunum higartil. Pápar og synir, vinmenn og so fólk, sum bara hava hug at fáa sær eitt kók, greiðir Birgir Enni frá.

### Snøri og tráðu

Norðlýsið hevur ikki fiskiloyvið, og tí kann fiskurin ikki seljast. Hinvegin fáa fólk fiskin heim við sær, og viðhvørt verður matgjørt við feskum fiski umborð á vegnum innaftur.

– Vit hava snøri umborð, og summi hava eisini tráðu við sær. Higartil hevur tað gingið væl at fáa fisk, sigur Birgir Enni.

Tað verða gjørdir tveir túrar um vikuna. Týskvøld og hóskvøld klokkan 19.00, og nú nógv ferðafólk fara at leita til Føroya, verður hetta uttan iva ein væl dámdur túrur.



*Mette Fønss, sum er komin til Føroya at fáa fólk at leggja av at roykja, syfti nakrar toskar, tá ið hon var úti við Norðlýsinum*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | 5 |
| Halifax | 10 |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 20 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 28 |
| Athen | – |
| Malta | 28 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst suður úr Íslandi mennist spakuliga og gongur eysturyvir.



Um vikuskiftið verður eitt nýtt lágtrýst væntandi fyri Suðurlandinum og mennist, meðan tað ferðast eysturyvir. Seinni kemur enn eitt lágtrýst vestaneftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/06 kl. 06[00]– 11/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,2°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 18,0 mm – mált frá 10/06 kl. 06[00]–11/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 36,8 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. juni: Fyrra kvarter
12. juni: Mánin næstur jørðini
714. juni: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 12. juni | 05.13 | 17.39 | 04.13 | 16.39 | 04.28 | 16.54 | 07.13 | 19.39 | 08.13 | 20.39 | 03.28 | 15.54 | 02.28 | 14.54 | 05.28 | 17.54 | 06.28 | 18.54 | 04.58 | 17.24 | 06.13 | 18.39 |
| 13. juni | 06.05 | 18.34 | 05.05 | 17.34 | 05.20 | 17.49 | 08.05 | 20.34 | 09.05 | 21.34 | 04.20 | 16.49 | 03.20 | 15.49 | 06.20 | 18.49 | 07.20 | 19.49 | 05.50 | 18.19 | 07.05 | 19.34 |
| 14. juni | 07.04 | 19.34 | 06.04 | 18.34 | 06.19 | 18.49 | 09.04 | 21.34 | 10.04 | 22.34 | 05.19 | 17.49 | 04.19 | 16.49 | 07.19 | 19.49 | 08.19 | 20.49 | 06.49 | 19.19 | 08.04 | 20.34 |
| 15. juni | 08.04 | 20.35 | 07.04 | 19.35 | 07.19 | 19.50 | 10.04 | 22.35 | 11.04 | 23.35 | 06.19 | 18.50 | 05.19 | 17.50 | 08.19 | 20.50 | 09.19 | 21.50 | 07.49 | 20.20 | 09.04 | 21.35 |




BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666




BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

5 707265 100043 >